inni - trygt og ómaksleyst til hús



## Sethús - Mørkin 21, Fuglafjørður

Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd uml: 178 fermetrar, umframt ein lítil hjallur. Grundøkið er 232 fermetrar. Byggiár: 1956. Húsini eru stoypt, hava alminiumstak og trævindeygu. Í miðhæddini er gongd, køkur, stova, wc og goymslurúm. Í ovastu hæddini er gongd, kladnarúm, baðirúm og 3 kømur. Í niðastu hæddini er wc, kjallararúm/-fýrrúm. Høgt er millum loft og gólv í niðastu hæddini so góður møguleiki er fyri at innrætta. Garður er runt húsini við trøðum og runnum. Húsini standa niðarliga í bygdini og hava gott útsýni út á fjørðin.



## Sethús – Vørðuvegur 9, Hósvík

Húsini eru í 2 hæddum – samlað búvídd 202 fermetrar. Grundøkið er 1110 fermetrar. Byggiár: 1979. Húsini eru væl hildin m.a. er tað mesta av miðhæddini nýgjørd, gólv, wc, listar og vindeygakarmar eru skift. Grundin er stoypt og ovara hæddini er klødd við timbur og takið er tjørupapp. Í ovaru hædd er gongd, wc, baðirúm, 2 kømur, hjúnarrúm, køkur, stova og hjallur. Í niðaru hædd er stórur durur, gongd, kamar, vaskirúm / kjallararúm, fýrrúm / goymslurúm, kamar / stova og baðirúm. Stórur urtagarður er runt húsini við blómum og trøðum. Sólkrókur (terassa) og drívhús er í urtagarðinum. Húsini standa í barnavinarligum umhvørvi beint við skúla, barnagarð og spælipláss. Prísuppskot: kr. 1.700.000,00.



## Randarhús – millum Gilja 83, Hoyvík

Endarandarhúsini eru í 2 hæddum á 65 fermetrar - í alt 130 fermetrar. Grundøkið er 282 fermetrar. Byggiár: 1990. Húsini eru væl bygd, væl hildin og í góðum standi. M.a. er nýtt tak og endaveggurin er klæddur av nýggjum. Í neðra er inngongd, durur, baðirúm, gongd / trappugongd, matarkøkur, vaskirúm / bryggers og stór borðsstova / stova við útgongd. Í erva er trappugongd / gongd, baðirúm, hjúnarrúm, baðirúm og 3 kømur. Húsini standa væl fyri í hugnaligum, friðarligum, tryggum og barnavinaligum umhvørvi og stutt er til spælipláss, dagstovn og busssamband. Prísuppskot: kr. 2.000.000,00.



## Sethús – Torfinsgøta 25, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum á 103 fermetrar - í alt 206 fermetrar. Grundøkið er 418 fermetrar. Byggiárið er 1963, men húsini eru dagførd og umvæld 2000-2007. Nýtt er m.a. tak, klædningur, vindeygu, radiatorar, hitaverk. Í erva er inngongd, durur, gongd, køkur, borðsstova, stova við útgongd, til altan / terassu, hjúnarrúm, baðirúm, 2 kømur og niðurgongd til kjallara. Í neðra er inngongd, gongd, vaskirúm / fýrrúm og garaga umframt sjálvstøðuga íbúð: Har er inngongd, durur, gongd, køkur, borðsstova, kamar. Húsini standa sera væl fyri í vøkrum urtagarði í friðarligum og hugnaligum umhvørvi nær miðbýnum. Stutt er til handlar, skúlar, dagstovnar og busssamband.



## Raðhús – Torkilsgøta 16, Hoyvík

Frálíku raðhúsini eru í 2 hæddum – niðara á 105 fermetrar og ovara á 60 fermetrar – í alt 165 fermetrar. Grundøkið er 239 fermetrar. Byggiár 2001. Húsini eru snøgg, væl hildin og sum nýggj. Í neðra er hjallur, inngongd, durur, gongd, bryggers, køkur, borðsstova / stova við útgongd til útigólv / terassu / sólkrók, hjúnarrúm, baðirúm og 2 kømur. Í erva er trappugongd, stova / alrúm / kamar, baðirúm og stórt kamar. Húsini standa væl fyri í hugnaligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við góðum grannalagi. Stutt er til skúla, dagstovn, spælipláss / sparkivøll, býlingshús og gott busssamband. Sólargangurin er góður og nakað av útsýnið er millum húsini. Prísuppskot: kr. 2.300.000,00.



## Sethús – Selatraðsvegur 861, Selatrað

Húsini eru í 2 hæddum – samlað búvídd 174 fermetrar. Harafturat er ein hjallur í 2 hæddum – í alt 56 fermetrar. Grundøkið er uml. 400 fermetrar. Byggiár 1982. Grundin og endaveggirnir eru stoyptir. Húsini eru klødd við timbri og hava flagtak. Meginparturin av vindeygunum í miðhæddini eru plastikk og restin er timburvindeygu. Í ovaru hædd er durur, wc, gongd, køkur, 2 stovur, goymslurúm og hjallur. Í niðaru hædd er gongd, 3 kømur, hjúnarrúm, baðirúm og kjallararúm / fýrrúm / vaskirúm. Húsini standa frítt fyri og hava sera gott útsýni. Prísuppskot: kr. 1.300.000,00.



## Tvíhús – á Flatabø 13, Eiði

Húsini eru eini tvíhús í 3 hæddum – samlað búvídd uml. 135 fermetrar, umframt krúpikjalla á uml. 30 fermetrar og hjall á 5 fermetrar. Grundøkið er 374 fermetrar. Byggiár: 1959. Miðhæddin og stórur partur av ovastu hædd eru heilt nýgjørd m.a. eru innveggir, gólv, køkur, baðirúm, el, ketil og bjálving skift. Vindeyguni eru skift í 1988. Í miðhæddini er gongd, stórur køkur, stova, og útigólv (terassa). Í ovastu hædd er gongd, baðirúm, 2 kømur og hjúnarrúm. Í niðastu hædd er goymslurúm, kjallararúm, fýrrúm / vaskirúm og krúpikjallari. Húsini standa í hugnarligum umhvørvi í Korndali og hava garð við stakitti runt húsini. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Dalavegur 20, Glyvrar

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd uml. 180 fermetrar. Grundøkið er uml. 1400 fermetrar. Byggiár uml. 1960. Í 1990 bleiv stórur partur av húsinum nýgjørdur. M.a. er køkur, stova, gongd og flestu vindeygu í ovaru hædd skift. Í ovaru hædd er durur, 2 gongir, køkur, stova, kamar, hjúnarrúm, baðirúm, goymslurúm, vaskirúm, hjallur og útigólv (terassa). Í niðaru hædd er gongd, kamar, goymslurúm og fýrrúm. Húsini standa í veðurgóðum umhvørvi og hava sera gott útsýni yvir fjørðin. Prísuppskot: kr. 1.300.000,00.



## Sethús í gerð – Gerðisgøta 10, Skála

Húsini verða í 2 hæddum, niðara hæddin 120 fermetrar og ovara hæddin 75 fermetrar – í alt 195 fermetrar. Grundøkið er 581 fermetrar. Húsini verða innilokað, og keyparin kann síðan sjálv/ur gerða av, hvussu tey vilja hava tey innrættað. Ásetti kostnaðurin umfatar stoyptan sokkul við áløgdum undirsløgum, innilokaði hús við Viking Window úthurðum, trævindeygum og bjálvaðum útveggjum, álagt tætt tróður og aluminiumtak við Icopal plasttakrennum. Farið verður undir at byggja, tá keypari er til húsini. Húsini koma at standa mitt í bygdini við góðum útsýni út yvir fjørðin. Prísuppskot: kr. 1.075.000,00.



## Sethús – Hvalvíksvegur 61, Hvalvík

Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd uml. 145 fermetrar umframt ein hjall. Grundin er stoypt og húsini eru klødd við alminiumsplátum og hava stáltak. Grundøkið er uml. 240 fermetrar. Byggiár: 1912. Í miðhæddini er gongd, køkur og 2 stovur. Í ovastu hædd er gongd, baðirúm og 3 kømur. Í niðastu hædd er kjallararúm / fýrrúm / vaskirúm. Húsini standa við vegin og hava gott útsýni.



## Tvíhús – Hvalsoyargøta 18, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum hvør á 95 fermetrar – í alt 190 fermetrar. Grundøkið er 367 fermetrar. Byggiár: 1990. Húsini eru dagførd í 2005 og eru í sera góðum standi. Í erva er inngongd, durur / garderoba, gongd, køkur / alrúm / borðsstova / stova, hjúnarrúm, baðirúm, 2 kømur. Í neðra er vaskirúm / fýrrúm og kjallarúm, ið væl ber til at innrætta. Húsini standa í barnavinaligum og friðarligum umhvørvi nær fríøki og nær býnum við góðum útsýni. Stutt er til dagstovnar, skúlar og busssamband. Prísuppskot: kr. 2.200.000,00.



## Snotilig sethús – undir Gráasteini 10, Kvívík

Snotiligu húsini eru í 2 hæddum - hvør á 94m² - í alt 188 m². Grundøkið er 792m². Byggiár: 1978, men húsini eru nýgjørd og dagførd. M.a er drenað og steinsett av nýggjum runt húsini, og klædningur, vindskeið, hjallur, fleiri vindeygu, allir sprossar, gólv, fleiri loft, listar, inn- og úthurðar, køkur, baðirúm og kamar í niðastu hædd er nýtt, og restin er alt nýtapetað og málað, kjallarin er pussaður og málaður, og klædningur og tak er nýmálað. Alt er sera snotiligt og sera væl hildið úti og inni. Har er hjallur, inngongd, durur / gongd, køkur / alrúm, borðsstova / stova, hjúnarrúm, baðirúm og 3 kømur. Í neðra er trappugongd, kamar, fýrrúm / vaskirúm / kjallarúm við egnari inngongd. Møguleiki er fyri at innrætta restina av niðastu hædd. Skotskir brotflísar til túnið fylgja við. Møguleiki er eisini fyri, at tað mesta av innbúgvinum kann fylgja við. Húsini standa í sera hugnaligum og náttúruvøkrum bygdaumhvørvi. Har er veðurgott, barnavinaligt og sera gott útsýni. Stutt er til busssamband, barnagarð, skúla og handil og bert 20 min. er til Havnar. Prísuppskot: kr. 1.400.000,00.



## Raðhús – Giljavegur 24, Hósvík

Húsini eru í 2 hæddum á 76,5 fermetrar – í alt 153 fermetrar. Grundøkið er 256 fermetrar. Byggiár: 2003. Húsini eru næstnorðastu húsini í røðini. Í ovaru hædd er gongd, kamar, baðirúm, hjúnarúm og køkur / stova. Í niðaru hædd er kjallararúm / fýrrúm / vaskirúm. Húsini eru sera orkusparin og brúka einans 1500 litrar av olju um árið. Høgt er millum loft og gólv í niðaru hædd, so góður møguleiki er fyri at innrætta hæddina, sum er gjørt í fleiri av hinum húsunum. Húsini standa í barnarvinarligum og friðarligum umhvørvi og hava sera gott útsýni yvir víkina. Prísuppskot: kr. 1.100.000,00.

# Eftirlýsing

**Vit hava stóran eftirspurning og hava selt so nógv hús, at vit hava nærum útselt. Tí søkja vit eftir ognum at selja. Hevur tú hug til at selja – vinaliga, set teg í samband við okkum í Inni.**

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Sosialurin